

# Føroyska operan til Íslands

Tjóðpallur Føroya og Aldubáran fara komandi tíðina til Íslands at framføra Í Óðamansgarði. Leikstjórin, Ria Tórgarð, og leikararnir, Hans Tórgarð og Gunnvá Zachariasen frá Tjóðpallinum, skulu saman við íslendskum tónleikarum, sangarum og dansarum, skulu tey standa fyri tveimum sýningunum av Í Óðamansgarði. Sýningarnar vera í Tjóðleikhúsinum í Reykjavík í døgunum 22. og 23. mai. Í Óðamansgarði er opera bygd á stuttsøgu eftir William Heinesen, og varð hon fyri fyrstu ferð sett upp í Norðurlandahúsinum í oktober mánað 2006. Tær seks sýningarnar eydnaðust væl, og fekk operan góð ummæli úti í heimi. Nú er avtala fingin í lag um at operan skal setast upp í Tjóðleikhúsinum í Reykjavík. Sunnleif Rasmussen hevur gjørt tónleikin til operuna, og Elisa Heinesen hevur gjørt pallmyndina. Tey vera bæði til staðar, tá operan verður sýnd í Tjóðleikhúsinum. Gunnvá Zachariasen og Hans Tórgarð spæla teir báðar høvuðsleiklutirnar, meðan sangarar og tónleikarar vera íslendingar. Operan verður framførd á føroyskum, men íslendskur tekstur verður gjørdur til sýningarnar.

# Í summar fer Ísland at søkja ES um limaskap

**Men tað verður íslendska fólkið, sum skal taka ta endaligu avgerðina á fólkaatkvøðu. Stjórnarflokkarnir eru framvegis samdir um at vera ósamdir**

**ÍSLAND**
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*



Samgonguskjalið hjá nýggju íslendsku stjórnini staðfestir, at tað verður fólkið, sum skal taka endaliga avgerð, hvørt landið skal fara upp í Evropasamveldið ella ikki. Teir báðir flokkarnir ásanna í samgonguskjalinum, at teir hava ikki somu áskoðan í spurninginum um limaskap í ES, og at teir eru samdir um at hava virðing fyri áskoðanini hjá hvør øðrum. Loksins staðfesta teir, at flokkarnir hava rætt til at tala fyri sínum sjónarmiðum í sambandi við ES-limaskapin.

Samgonguskjalið sigur ikki, nær íslendska stjórnin fer at senda ES umsókn um limaskap, men at í vársetuni skal uttanríkisráðharrin leggja uppskot fyri Altingið um at senda ES umsókn um limaskap. Jóhanna Sigurðardóttur, forsætisráðharri, segði við fjølmiðlarnar í gjár, at umsóknin ætlandi fer avstað úr Reykjavík í juli.

Íslendsku stjórnarflokkarnir gera vart við, at tað er avgerandi fyri ta endaligu støðutakanina hjá stjórnini, hvat samráðingarúrslitið sigur um eitt nú fiskivinnu, landbúnað, umhvørvi og onnur týðandi viðurskifti.

## Ósamdir leiðarar

At Samfylkinginm og Vinstrafylkingin ikki draga eina línu í ES-málinum kom enn eina ferð til sjóndar á tíðindafundi í Reykjavík í gjár.

Har segði Jóhanna Sigurðardóttur, forsætisráðharri og formaður í Samfylkingini, at umsóknin til Bruxelles skal sendast avstað í seinasta lagi í juli, og hon legði áherslu á, at Altingið eigur at avgreiða málið í hesari setuni.

Tað helt formaðurin í Vinstrafylkingini, fíggjarmálaráðharrin Steingrímur J. Sigfússon, ikki.

-Eg haldi ikki, at hetta er tað týdningarmesta málið í íslendskum politikki í løtuni. Tað týdningarmesta er her hjá okkum sjálvum. Tað er okkara samfelag, okkara vinnulív og okkara familjur, segði hann og helt fram:

-Vit eiga ikki at lata ES-málið órógva tær bráðneyðugu og týdningarmiklu avgerðunum, sum eru neyðugar at taka.

## Taka fiskiloyvi innaftur

Samgonguskjalið hjá nýggju stjórnini umrøður øll málsøki, og ikki óvæntað fær fiskivinnan serliga drúgva umrøðu.

Undir valstríðnum boðaðu bæði Samfylkingin og Vinstrafylkingin frá, at eftir teirra tykki skal tað almenna afturkalla øll latin veiðiloyvi, samstundis sum møguleikarnir at selja veiðiloyvi verða skerdir, meðan brúksskyldan verður herd. Øll hesi viðurskiftini eru í samgonguskjalinum, og gongst sum ætlað koma broytingarnar í gildi 1. september í 2010, tá nýtt fiskiár byrjar.

Í samgonguskjalinum verður staðfest, at fiskastovnarnir eru ogn fólksins, og at loyvi, sum verða latin til at gagnnýta fiskatilfeingið, eru tíðaravmarkað og kunnu undir ongum umstøðum gerast ogn hjá einstaklingi ella felagi ella rættindi, sum ikki kunnu kallast aftur.



# Filmur um lívið hjá falki

**Í morgin sýnir Norðurlandahúsið íslendska filmin »Í ríki fálkans«**

Filmurin »Í ríki fálkans« gevur okkum innlit í lívið hjá falki, samlívið hjá falki og rýpu í náttúruni og rannsóknir Ólafs K. Nielsens av hesum fuglum. Vit fylgja við tveimum falkapørum á Norðurlandinum, lívsbardaga teirra og hvussu tað eydnast teimum at ala ungar sínar. Ólafur kannar rýpur víða um landið m. a. í Hrísey, har rýpur vera merktar um heystið á hvørjum ári.

Magnús Magnússon hevur tikið upp, tað mesta seinastu sjey árini, men í filminum eru eisini eldri upptøkur, tann elsta tikin fyri sløkum tríati árum síðan.

Tónleikurin er eftir Tryggva M. Baldvinsson, og Matthías Hemstock, Óskar Guðjónsson og Ómar Guðjónsson hava spælt hann inn.

**Tekstur:** Helgi H. Jónsson og Ólafur K. Nielsen.
**Týðing:** Elis Poulsen.
Frásögufólk umframt Ólaf K. Nielsen er Oddný Helgadóttir.
**Stjórn:** Magnús Magnússon og Karl Sigtryggsson.
**Framleiðari:** Emmsonfilms
Filmurin verður vístur í Norðurlandahúsinum týsdagin 12. mai. Magnús Magnússon, filmsleikstjóri, verður hjástaddur. Sí annars heimasíðu Norðurlandahúsins: www.nlh.fo

# Optikbúðin í vøkstri

**Í Optikbúðini í Havn hevur framgongd verið seinastu árini, og tveir optikarar starvast nú í fyritøkuni, sum heldur til í Bøgøtu 5. Í Optikbúðini eru tey væl nøgd við ekort skipanina og nøgv ekort eru farin ígjøgnum**

**EKORT**
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Optikbúðin hevur verið 21 ár í Bøgøtu í Havn, og er sostatt ein sonevnd havnarmynd. Men tó ikki ein mynd, ið ikki broytist.

Fyritøkan er nógv vaksin, við tveimum optikarum í starvi.

Sjey starvsfólk eru knýtt at Optikbúðini.

Í optiktikbúðini hava tey allar optiskar vørur, so sum brillur, sólbrillur, linsur og kikarar.

Optikbúðin hevur sera stórt úrval, og dentur verður lagdur á at hava merkivørur, og at góðskan er í hásæti.

Virksemið er nógv vaksið seinnu árini, og fyritøkan hevur eisini fylgt við. Øll útgerðin til at kanna eygu við er nýggj, og tað er nýggjasta tøkni, ið verður nýtt.

Í Optikbúðini hava tey úr at gera, og hvønn dag verða nógvar sjónkanningar gjørdar.

Eisini lata tey í Optikbúðini væl at skipanini við ekortum, og har eru nógv ekort farin ígjøgnum, verður sagt, og sjálvsagt fegnast tey um, at ljós nú verður varpað á fyrimunirnar við ekortinum, so enn fleiri fáa lut í teim fyrimunum, ið kortið hevur.



*Optikbúðin heldur til nýggju húsunum í Bøgøtu í Havn – har gamla bakaríið í Horni stóð*